Grundarsteinur

# VÆLFERÐ

## Innihaldsyvirlit

Aðalmál . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 211
Samandráttur . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 211
Vælferð og vælferðargransking . . . . . . . . . . . . . . 213
    Vælferðarsamfelagið . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 213
    Vælferðar- og heilsugransking. . . . . . . . . . . . 216
    Vælferðarráð. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 219
Vælferð hjá børnum og ungum . . . . . . . . . . . . . 219
    Arbeiðslív samvirka við barna- og familjulív . 219
    Samstarv á barna- og ungdómsøkinum . . . . 220
    Rættindi hjá børnum og ungum styrkjast . . . 221
Vælferð hjá førleikatarnaðum
og fólki við skerdum uppihaldsmøguleikum. . . . 222
    Vælferðarskipan . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 222
    Atkoma. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 223
    Bústaðarmøguleikar . . . . . . . . . . . . . . . . . . 223
    At vera virkin. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 224
    Arbeiðs- og útbúgvingarmøguleikar . . . . . . . 224
    Inntøkutrygd . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 225
    Uppihaldspeningur . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 226
Eldravælferð . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 227
    Pensjónsskipan. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 227
    Eldrabústaðir og eldrarøkt. . . . . . . . . . . . . . 228
Fjølbroyttir bústaðarmøguleikar. . . . . . . . . . . . . 229
    Mál fyri bústaðarøki . . . . . . . . . . . . . . . . . . 229
Fólkaheilsa og heilsuverk . . . . . . . . . . . . . . . . . 231
    Fólkaheilsa . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 231
    Samskipan . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 232
    Apoteksverkið. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 234
    Heildarpsykiatri . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 234

# Aðalmál

## Aðalmálið er at tryggja eitt gott samfelag fyri øll

### Samandráttur

Okkara fremstu almanna- og heilsupolitisku mál eru, at fólkið skal trívast, mennast og fjølgast í okkara landi. Hetta skal gerast við at tryggja øllum borgarum neyðugar umstøðar fyri góðum lívskorum í einum vælskipaðum vælferðarsamfelag, har sínámillum ábyrgdin millum borgaran og myndugleikan, eins væl og samhaldsfestið millum øll, verður sett í hásæti.

Sama, hvør sosiala og persónliga støða borgarans er, skal øllum verða tryggjað rættindi og atgongd til munagóðar almanna- og heilsutænastur, so sum vit hava neyðugan tørv á. Hetta setur støðug politisk krøv til áhaldandi innihaldsliga, bygnaðarliga og fíggjarliga menning av okkara vælferðarskipanum. Tí seta vit okkum mál og leggja ætlanir fram í tíðina.

Grundarsteinurin undir vælferð fevnir um nógv mál, og til tess at fáa yvirlit yvir tey, eru tey savnað í seks bólkar: Vælferð og vælferðargransking, Børn og ung, Førleikatarnað og fólk við skerdum uppihaldsmøguleikum, Eldri, Fjølbroyttir bústaðarmøguleikar og Fólkaheilsa og heilsuverk. Tó slepst ikki undan, at bólkarnir nerta eitt sindur við økini hvør hjá øðrum.

Vælferðarsamfelagið skal mennast, so at tað stuðlar upp undir tær avbjóðingar, ið standast av alheimsgerðini og einstaklingagerðini. Vælferðar- og heilsugransking skal vera ein týðandi táttur í at tryggja føroyingum eitt vælvirkandi heilsu- og almannaverk, og skipað skal verða eitt vælferðarráð, ið ger viðmerkingar til tann førda vælferðarpolitikkin í einum langtíðarhøpi.

Barna- og familjulívið og arbeiðslívið eiga at kunna samvirka meiri, og rættindini hjá børnum og ungum skulu styrkjast. Vælferðarskipanin skal forða fyri sosialari avbyrging, og bústaðarmøguleikarnir hjá førleikatarnaðum eiga at verða tryggjaðir. Kropsliga og sálarliga tarnað eiga at fáa hjálp, so at tey kunnu vera so virkin í samfelagnum, sum til ber, og so at flest møguligt gerast fíggjarliga sjálvbjargin. Sum liður í hesum skulu útbúgvingarmøguleikarnir hjá førleikatarnaðum tryggjast. Uppihaldspeningur skal koma betur til góðar hjá teimum, ið veruliga tørvar hann, eins og førleikatarnaðum eigur at verða tryggjað ein inntøka, sum kann tryggja teimum eitt gott og virðiligt lív, sama hvør arbeiðsførleiki teirra er.

Fyri tey eldru eigur pensjónsskipanin at gerast betri og javnari, eldrabústaðir og eldrarøkt skulu samantvinnast betur, eins og trygd skal verða fingin fyri, at tørvurin á eldrabúplássum verður nøktaður. Ein broytt bústaðarlóggáva skal harumframt skapa fyritreytir fyri fjøltáttaðum bústaðarmøguleikum fyri føroyingar sum heild.

Heilsan eigur at vera ein tilvitaður táttur í gerandisdegnum hjá einstaklinginum, soleiðis at fólkaheilsan sum heild batnar í samfelagnum. Ymisku partarnir í heilsuverkinum og psykiatriini skulu samskipast og samarbeiða betur.

#### Sektorábyrgd á vælferðarøkinum

Vælferðarpolitikkur er eitt stórt øki, og tí skal sektorábyrgd fremjast sum aðalregla í øllum samskifti millum borgara og samfelag og útinnast í samvirkandi netverkum.

Aðalreglan um sektorábyrgd má staðfestast og fáast at virka, so at hvør myndugleiki á sínum virkisøki hevur ábyrgd av, at mál, ið fevna um fleiri myndugleikar, verða røkt á fullgóðan hátt. Ein virkin sektorábyrgdarpolitikkur fyribyrgir, at trupulleikar, ið áttu at verið loftaðir í góðari tíð, ikki enda í síðsta bjargingarnetinum, almannalóggávuni.



Nýggir gráøkistrupulleikar vilja tó altíð vera; t.e. mál, ið ikki hóska inn í tær gjørdu skipanirnar, ella sum ógreiða er um í lógunum. Avbjóðingin er at byrgja fyri, at nakar dettur niður í millum skipanirnar, og verður sektorábyrgdin framd til fulnar, broytast gráøkini frá at vera tómrúm til at verða fruktagóð øki, har fleiri enn ein myndugleiki kennir ábyrgd, heldur enn eingin. Tískil skulu myndugleikarnir læra at samstarva, soleiðis at fólk sum skjótast verða víst á rætta stað. Tað krevur, at øll almenn starvsfólk vita av hvør øðrum, kenna samfelagsbygnaðin og mannagongdirnar millum sektorarnar.

### Økistænastudeplar

Yvirskipað eiga allar tænastur á almanna-, heilsu- og skúlaøkinum, sum landið ætlar skulu liggja nær borgarunum, at verða savnaðar í 6-8 økistænastudeplar kring landið, so at borgarin hevur *eitt* stað at venda sær. Sum dømi kunnu barnaverndar-, heilsufrøði- og kommunulæknatænastur vera á sama stað. Fyrimunurin er, at møguleiki verður at samstarva og at samskipa tænastuna og tillaga hana til tørvin hjá einstaka borgaranum. Tað krevur tó, at hvør eindin hevur eitt púra greitt uppgávu- og ábyrgdarøki.

### Vælferðarportalur

Sum liður í at styrkja sektorábyrgd og at seta á stovn økisdeplar fyri vælferð, er ein felags vælferðarportalur fyri bæði myndugleikar og borgarar eitt gott amboð, og er somuleiðis eitt natúrligt stað hjá fólki at byrja, tá ið tey skulu leita seg fram til vælferðartænastur. Tað er ein sannroynd, at alnetið verður nýtt alsamt meiri, og tískil er tað eisini natúrligt, at vælferðarøkið verður partur av hesi menning.

## Vælferð og vælferðargransking

Vælferð fevnir ógvuliga vítt. Lutvíst eru nógvar vælferðarskipanir, ið allar mugu verða mentar, men eisini er vælferð eitt sera yvirskipað fyribrigdi, ið spælir saman við at siga øllum samfelagnum, og tí eru altíð nógvir aðrir møguleikar fyri vælferðarskipanum enn júst teimum, ið nú eru. Tískil er stórur tørvur á vitan um vælferðarsamfelagið, soleiðis at nýggj rák koma undan kavi og kunnu gerast ein partur av politikkinum.

## Mál fyri vælferð og vælferðargransking

Orðað eru partmál fyri:

- Vælferðarsamfelagið
- Vælferðar- og heilsugransking
- Vælferðarráð

## Vælferðarsamfelagið

Vælferðarsamfelagið skal mennast, so at tað stuðlar upp undir tær avbjóðingar, ið standast av alheimsgerðini og einstaklingagerðini

Samfelagsligi karmurin í Føroyum líkist teimum skandinavisku vælferðarsamfeløgunum. Breið semja er um at menna vælferðarsamfelagið og sosialu skipaninar í Føroyum, soleiðis at tær eru sambæriligar við tær í grannalondum okkara. Hóast mótstøðu og atfinningar, hevur norðurlendska skipanin víst seg at vera haldgóð. Hon fremur trivnað, javnstøðu og tryggleika, samstundis sum hon hevur við sær vøkstur, samstarv og nýskapan. Tað er ikki tann stóri munurin millum høg og lág, og tí eru fortreytir til staðar fyri betri javnvág millum samfelagslig áhugamál. Skipanin hevur eisini megnað at laga seg til skiftandi samfelagsumstøður og hevur tryggjað vinnuni best møguligu kor, t.d. við donsku »flexicurity-skipanini,« ið bæði tryggjar smidleika á arbeiðsmarknaðinum og sosialan tryggleika. Ein sunn vælferðarskipan byggir á samfelagsligt rættvísi, samhaldsfesti og rættartrygd borgarans.

Umráðandi er tó at skilja ímillum samfelagsliga vælferð og sosiala vælferð. Samfelagslig vælferð gevur øllum borgarum møguleika at nýta evni síni til at skapa sær eitt gott lív í einum samfelag, sum ikki hevur ov stórar ójavnar millum borgarar, sum allir borgarar kenna seg eiga samhaldsfastan lut í og virka í sum einstaklingar ella í felag, og har allir borgarar arbeiða og luttaka eftir førimuni.

Sosial vælferð eru hinvegin fyriskipanir, ið settar eru í verk fyri at tryggja borgarar, ið hava serligan tørv á heilsu-, almanna- og skúlaverki, og á pensjóns- og arbeiðsloysisskipan.

### Universalistisk vælferðarskipan – vælferðarskipan fyri øll

Ein vælvirkandi vælferðarskipan byggir á samarbeiði millum almennar stovnar, virkir og sjálvbodnar felagsskapir, samstundis sum tryggjað verður, at familjulív og arbeiðslív hanga saman. Sosialar veitingar og tænastur skulu fremja sjálvhjálpni sum best, og skulu ikki hava við sær passiva forsyrging. So stutt sum gjørligt skal vera millum borgara og stovn. Somuleiðis er umráðandi, at

vælferðartænastur verða veittar út frá einum heildarsjónarmiði (holismu) og eini meting av tørvi og møguleikum.

At okkara vælferðarskipan í framtíðini verður grundað á universalismu, merkir, at allir borgarar hava ávís grundleggjandi rættindi í trongstøðum so sum arbeiðsloysi, sjúku og aldurdómi, og at allir borgarar – sama, hvat tilknýti teirra til arbeiðsmarknaðin er – hava rætt til sosialar veitingar og tænastur. Henda universalistiska skipan byggir á eina samhaldsfasta fígging og ábyrgd, ið ber í sær, at sosialu veitingarnar í høvuðsheitum eru fíggjaðar gjøgnum vanligan skatt, ið tað almenna, land og kommunur, hava ábyrgdina av at útvega, helst í samstarvi við privatar stovnar.

### Alheimsgerðin skapar nýggjar avbjóðingar

Vælferðarsamfelagið stendur framman fyri stórum avbjóðingum. Alheimsgerðin skapar opnari marknaðir, størri flytføri og tørv á nýskapan, vinnuliga eins og umsitingarliga. Alheimsgerðin skapar sostatt fyritreytirnar fyri samfelagsligu menning okkara, men leggur samstundis trýst á vælferðarsamfelagið í sínum verandi formi, eins og ivasama menningin av orkukostnaðinum kann leggja trýst á, soleiðis sum samfelagið er skipað í dag. Fyri at verða verandi í fremstu røð, er tí neyðugt at gera strategiskar íløgur í menniskju, útbúgving, vitan, menning og undirstøðukervi, so vit kunnu standa okkum ímillum lond, sum leggja alla orku í at vera á odda.

Einstaklingagerðin ber í sær, at fólk vil hava fleiri valmøguleikar, eisini tá ið ræður um almennar tænastur. Her er tó talan um eina tvístøðu, tí øktu krøvini til vælferðartænastur kunnu í sjálvum sær økja um skattatrýstið og sostatt elva til ónøgd um vælferðarsamfelagið, eins og vandi kann verða fyri, at fyritøkur, kapitalur og arbeiðspláss flyta av landinum, um skattatrýstið verður ov høgt. Samstundis gerst alt lættari hjá fólki at flyta millum lond – serliga hjá teimum vælútbúnu. Miðallivialdurin hækkar eins og arbeiðsmegin hevur lyndi at minka, av tí at tey ungu oftari fara undir langar útbúgvingar, og eldra ættarliðið fer fyrr av arbeiðsmarknaðinum. Her ræður um at finna skipanir, so at tey eldru verða eitt samfelagstilfeingi og ein mentanarberi.

### Breiðkað vælferðarfígging

Tørvur er á støðugum tillagingum av vælferðarsamfelagnum. Tí eiga einskiljingar, ófullfíggjað undirstøðukervi, kommunal yvirtøka av málsøkjum, ójavnar millum miðstaðarøkið og útjaðaraøkini, umframt umhvørvis- og orkuspurningar at teljast millum málini, ið politiska skipanin og eitt møgiligt vælferðaráð eygleiða og umrøða gjølla.

Tað nógva av virkseminum á almannaøkinum er í dag skattafíggjað, og eitt støðugt politiskt trýst er fyri at minka um útreiðslurnar. Tí hevur verið tosað um, at ávísar veitingar av røttum áttu at verið avmarkaðar til fólk við fíggjarliga trongum kørmum, og/ella at eitt hámark átti at verið sett fyri veitingum.

Ein møguleiki er at lata egingjald fylgja einum størri parti av veitingunum. Endamálið við brúkaragjaldi skal vera at ávirka hugburðin hjá borgaranum ella at geva honum høvi at velja annað enn minstuveiting við at gjalda munin.



Annar møguleiki enn skattafígging er at gera fleiri av veitingunum ella tiltøkunum í almannalóggávuni tryggingarfíggjað, við at arbeiðsmarknaðurin – tí tað lønar seg – tekur ábyrgd, bæði fíggjarliga og við at skapa karmar fyri at lofta teimum forfjónaðu. Tað gerst t.d. við at ALS eisini fær ábyrgd av endurbúgvingartiltøkum til arbeiðsleys.

Ein triði møguleiki er við lóg at áleggja arbeiðsgevarum at rinda ein størri part av dagpeningaútreiðslunum í sambandi við hvørt sjúkuskeið, so at arbeiðsgevararnir verða eggjaðir til at fáa tann sjúka aftur í arbeiði.



## Vælferðar- og heilsugransking

Vælferðar- og heilsugransking skal vera ein týðandi táttur í at tryggja føroyingum eitt vælvirkandi heilsu- og almannaverk

Vælferðar- og heilsugransking eigur at vera ein týðandi táttur í at tryggja føroyingum eitt vælvirkandi heilsu- og almannaverk, tí við at greina tørvin á heilsu- og almannatænastum, kann hon betra um grundarlagið undir raðfestingum á økinum. Harumframt kann granskingin vera við til at útvega, fasthalda og menna vælskikkað starvsfólk, sum eru ein fortreyt fyri at veita borgarum munagóðar heilsu- og almannatænastur. Tí hevur tað stóran týdning at eggja starvsfólkum í almanna- og heilsuverkinum til at nýta ein part av tíð síni til gransking og menning, og í summum førum eigur tað at verða teimum álagt.

### Betri granskingarumstøður

Skal føroysk vælferðargransking fáast at virka, er neyðugt at seta av byrjanarpening, at samstarva við granskarar og granskingarstovnar í Føroyum og úti í heimi, og at Føroyar eru við í granskingarsamstarvinum hjá ES og Norðurlondum. Umframt hetta er neyðugt, at bæði almannaverkið og heilsuverkið skapa umstøður fyri gransking og menning, so at vit harvið byggja upp egnan granskingarførleika og eina greiningarskrivstovu.

### Betri hagtalsgrundarlag

Setast skulu í verk talgildar hagtalsskráir, har upplýsingar um ávís íbúgvaraviðurskifti, harí demografisk og sosial viðurskifti, bústaðarviðurskifti, arbeiðsmarknaðar- og útbúgvingarviðurskifti støðugt verða dagførdar. Grundar-

lagið undir eini nýggjari hagtalsskipan er ein fólkateljing. Fólkateljingin skal verða framd í 2010.

Ein KT-høvuðsskipan fyri Almannastovuna kann gera hana til fremsta vitanarsavn fyri gransking á sosiala økinum. Gerast kunnu umfevnandi og nøktandi hagtalsyvirlit, sum kunnu geva eitt gott samanberingargrundarlag, eisini við onnur Norðurlond. Hetta gevur møguleikar at gera metingar um, hvussu framtíðin kann verða, metingar, ið kunnu vera støði undir týðandi avgerðum. Eisini eru møguleikar at samskipa hagtøl um heilsuøkið betur við nýggju, talgildu heilsuskipanina.

Vælferðar- og heilsugransking krevur pening, og peningur skal setast av til bæði leyskeyp av starvsfólki og til tilknýti av granskaraførleika, umframt til íløgur og rakstur. Fyri at røkka á mál í 2015, er neyðugt at seta av pening til vælferðar- og heilsugransking beinanvegin, tí granskingin er áhaldandi og mennist ár um ár, og jú fyrr hon verður sett í verk, tess meiri mennist hon til 2015.

## Sosialfrøðilig granskingarevni

### Yvirskipað vælferðargransking

At granska okkara fjølbroyttu vælferðarskipanir sum heild fer at geva okkum høvi at samanbera Føroyar við onnur lond, soleiðis at vit fáa staðfest, hvørji vælferðarligu serfyribrigdi okkara eru. Tað kann m.a. hava við sær eina støðuga lýsing og máting av góðum og ringum avleiðingum av verandi almannalóggávu og fyriskipanum. At greina vælferðarskipanir, vælferðarfígging, arbeiðsmarknað og neyðugar broytingar í mun til búskaparmenningina og demografisku gongdina kann eisini vera partur av yvirskipaðu vælferðargranskingini.

### Umsorgar- og eldragransking, barna- og ungdómsgransking

Umsorganar- og eldragransking lýsir ikki bara stuðuls- og røktartørv teirra gomlu og teirra brekaðu, men eisini hvussu vit kunnu nøkta hesar tørvir á besta hátt. Barna- og ungdómsgransking skal bæði lýsa umstøðurnar sum heild, serstøk viðurskifti, og gera tað gjørligt at fylgja gongdini, eisini samanborið við støðuna í grannalondunum.

### Lívskorsgransking

Granskað eigur at verða í yvirskipaða, sosiala ójavnanum, bæði í samfelagnum sum heild, í nærsamfelagnum og millum nærsamfeløg. Ábendari sum vinnumynstur, útbúgvingarstig, inntøkuviðurskifti, familjustøða, fasthaldni til arbeiðsmarknað, bústaðarumstøður o.a. eru týdningarmikil granskingarevni, eitt nú til at lýsa sosialan ójavna, lívskorstrupulleikar og beinleiðis fátækradømi. Samanspælið millum familju- og javnstøðupolitikk og arbeiðsmarknað, vælferðarskipanir og burðartíttleika kann eisini vera partur av hesum.

## Heilsufrøðilig granskingarevni

### Ílegugransking

Føroyingar hava ligið fjarskotnir úti í havi í øldir og eru arvaliga homogenir. Tí er hugsandi, at arvaliga treytað heilsu- og sjúkufyribrigdi eru øðrvísi hjá okkum enn hjá øðrum, og hetta er í sjálvum sær orsøk til at kanna hesi



fyribrigdi. Harafturat kemur tann sannroynd, at ættartrø og sjúkuavgerðir eru væl skrásett her, og tí ber eisini til at leita eftir nýggjum ílegum, sum enn eru ókendar hjá mannaættini.

**Arbeiðsumhvørvisgransking**

Umhvørvi okkara er serligt. Her verður fyrst og fremst hugsað um arbeiðsumhvørvið á havinum, í alingini og fiskiídnaðinum. Í Føroyum hava vit eitt serliga gott høvi at kanna, hvussu sjólívið ávirkar heilsu teirra, sum arbeiða á sjónum. Slíkar kanningar verða til gagns fyri okkum sjálvi, men fara eisini at ríka altjóða vitan um heilsufrøði á sjónum.

**Matgransking**

At granska, hvat fiskur og fiskaúrdráttur hevur at siga fyri heilsuna hjá fólki, hevur stóran týdning, bæði fyri okkum búskaparliga, men ikki minst fyri fólkaheilsuna kring heimin, tí fiskur er umráðandi mattilfeingi.

**Heilsustøðugransking**

Útvegast skal vitan, sum bæði lýsir heilsustøðuna hjá føroyingum og gongdina á økinum. Tilevnast skulu vælvirkandi eftirlitsskipanir, sum fylgja við fólkaheilsuni, gongdini við sjúku- og deyðstíttleika og vandatáttum, og gerast skulu kanningar, sum lýsa samanhangin millum lívshátt og heilsu.

## Vælferðarráð

Skipað skal verða eitt vælferðarráð, ið ger viðmerkingar til tann førda vælferðarpolitikkin í einum langtíðarhøpi

Vælferðarráðið skal meta um framtíðarútlitini, greina tær avbjóðingar, ið standa fyri framman, og birta upp undir orðaskifti, ið kann stimbra viljan til, burðardygga og ábyrgdarfulla menning av einum samhaldsføstum vælferðarsamfelagi.

Vælferðarráðið ger viðmerkingar, setur kanningar í verk og umrøður avleiðingar av førdum politikki í einum langtíðarhøpi. Tað kann vera við til at fyribyrgja, at avbjóðingar verða handfarnar skeivt ella á vantandi avgerðargrundarlagi. Harumframt kann vælferðarráðið vera við til at menna orðaskiftið um vælferðarpolitiskar spurningar í Føroyum, eins og tað kann veita ráð um grundleggjandi, etiskar og søguligar tættir í vælferðarorðaskiftinum. Vælferðarráðið eigur at leggja áherðslu á, at vælferðarpolitikkur er ein fortreyt fyri búskaparligari og vinnuligari menning og vælveru.

Vælferðarráðið hevur sjey limir og skipar seg sjálvt. Tað verður skipað við lóg eins og Búskaparráðið. Fýra av limunum eiga at hava serligt innlit í sosialar skipanir, arbeiðsmarknaðarskipanir og sjálvbodnar skipanir í Føroyum, og tríggir av limunum eiga at hava breiðan búskapar- og samfelagsfrøðiligan serkunnleika. Landsstýrið setir vælferðarráðið eftir tilmæli frá Setursráðnum og gevur tí nøktandi arbeiðsumstøður, m.a. til at kunna skriva árliga vælferðarfrágreiðing.

## Vælferð hjá børnum og ungum

Eitt barna- og ungdómspolitiskt heildarútspæl fevnir sera víða – og hevur antin beinleiðis ella óbeinleiðis við mest sum allar tættir í samfelagnum at gera. Av somu orsøk eiga fyrilit fyri børnum og ungum at síggjast aftur í flest øllum lutum í samfelagnum og sostatt í øllum grundarsteinunum í Visjón 2015. Sum t.d. undir bústaðarpolitikk, ið eisini viðvíkir bústaðarviðurskiftum hjá barnafamiljum. Dentur lagdur á barna- og ungdómsgransking í partinum um vælferð og vælferðargransking.

## Mál fyri vælferð hjá børnum og ungum

- Arbeiðslív samvirka við barna- og familjulív
- Økt samstarv á barna- og ungdómsøkinum
- Rættindi hjá børnum og ungum skulu styrkjast

## Arbeiðslív samvirka við barna- og familjulív

Familjuni verða tryggjaðar bestu umstøður við lagaligum skipanum á arbeiðsmarknaðinum, soleiðis at bæði foreldrini fáa betri stundir at vera saman við børnunum

### Smidligari skipanir á arbeiðsmarknaðinum

Arbeiðsmarknaðurin skal skipast á ein slíkan hátt, at arbeiðslívið samvirkar betur við familjulívið. Til tess at røkka hesum máli er neyðugt við smidligum skipanum, sum hava tað rætta fyrilitið fyri støðuni hjá familjuni. Møguleikarnir fyri smidligum arbeiðstíðum skulu betrast, t.d. við flekstíð, heimaarbeiðsplássi og vaktararbeiði,

eins og arbeiðslívið sum heild eigur at verða skipað við hygni fyri tørvinum hjá familjuni.

Allir løntakarar skulu kunna vera heima við løn á fyrsta og næsta sjúkradegi hjá børnum.

### Smidligari og víðari farloyvisskipanir

Skipanin við barnsburðarfarloyvi skal víðkast til eitt ár, og farloyvistíðin skal býtast javnt millum foreldrini. Haraftur-at eigur at verða gjørd ein nýggj farloyvisskipan, soleiðis at børn og foreldur kunnu vera meiri saman, meðan børnini eru smá. Skipanin skal fevna um eitt ávíst tal av vikum, sum foreldrini antin kunnu taka í einum ella fleiri umførum. Skipanin skal vera smidlig, so at hon hóskar til tørvin hjá barnafamiljuni.

### Ansingartrygd og víðkaðar ansingartíðir

Ansingartrygd eigur at verða veitt øllum børnum, og ansingartilboð skulu hóska til tørvin hjá barnafamiljuni, so at børnini kunnu verða ansað uttan fyri vanliga upp-latingartíð, um kvøldið og um náttina. Sostatt kunnu foreldur við skiftandi arbeiðstíðum fáa børnini ansað á føstum stað, ið hevur tryggar karmar, ið børnini kenna. Mark skal tó vera fyri, hvussu nógvar tímar eitt barn kann vera á stovni.

Miðast skal ímóti, at øll starvsfólk, sum fáast við børn og ung, skulu vera væl skikkað og útbúgvin, sum skal tryggja eitt gott, fakligt støði og góð ansingartilboð. Starvsfólkini skulu hava tilboð um afturvendandi eftirút-búgving, og støðugar eftirmetingar av starvsfólkum og leiðslum skulu gerast. Stovnarnir skulu harumframt seta mál fyri starvsfólk og stovn.

## Samstarv á barna- og ungdóms-økinum

Barna- og ungdómsøkið skal skipast og samskipast, so at tilboðini vera børnunum og teimum ungu at frama

### Sektorábyrgd

Sektorábyrgd hevur serliga nógv at týða fyri barna- og ungdómsøkið. Kommunurnar hava t.d. ábyrgd av, at byggisamtyktin hevur fyrilit fyri, at børn og ung hava um-støður at ferðast og spæla trygt. Kommunurnar skulu somuleiðis skapa nærumhvørvinum karmar, ið birta upp undir ein góðan og sunnan lívsstíl hjá børnum og ungum. Á sama hátt skulu landsmyndugleikar so sum Landsverk, Almannastovan, Sernámsdepilin, Barnatæn-astan og undirvísingarverkið sum heild hava ans fyri barna- og ungdómsøkinum. Tað er neyðugt við einum skipaðum samstarvi millum teir ymsu sektorarnar, um endamálið við barna- og ungdómspolitikkinum skal røkkast.

### Innskúlingin gerast smidligari

Skiftið millum barnaansing og fólkaskúlan skal vera smidligari, og stirvnu fakmørkini á barnaansingar- og fólkaskúlaøkinum eiga at verða burturtikin, so at ymsir fakbólkar kunnu virka á báðum økjum. Fyrstu árini í skúlanum verða harvið ein samanrenning av fakligum og sosialum avbjóðingum.

Skúlarnir skulu vera miðsavnandi deplar í nærumhvørv-inum hjá børnunum, har tey eisini eftir skúlatíð t.d. hava møguleika at fáast við fjøltáttaðan og mennandi ítrótt og ítriv og kunnu gera og fáa hjálp til skúlating.

### Barnatænastan styrkjast

Skipanin við heilsufrøðingum skal styrkjast og mennast og soleiðis stuðla upp undir, at øll børn frá gitnaði til 18 ára aldur mennast, trívast og fáa rík og heilsugóð barna- og ungdómsár. Tætt og skipað samstarv eigur at verða millum barnatænastuna og tey, sum annars dagliga starvast við børnum og ungum

## Rættindini hjá børnum og ungum styrkjast

Aðalmálið við barna- og ungdómspolitikkinum er, at øll børn og ung skulu hava somu rættindi og somu møguleikar, sama hvørjar fortreytir og umstøður tey annars hava

Virðingin fyri rættindunum hjá børnum skal styrkjast. Nú revsirætturin er avtikin, skulu vit fremja eina hugburðsbroyting, so at eingin ivi er um, at tað er skeivt at vera børnum at meini. Hetta samtykkir eisini við barnaverndarlógina, ið áleggur øllum at boða avvarðandi barnaverndartænastu frá, um tey varnast, at barn verður misrøkt, meinslað ella misnýtt. Harumframt eigur at setast á stovn viðgerðarstað fyri børn, ið hava verið fyri kynsligum ágangi.

### Orðast skal ein barna- og ungdómspolitikkur

Avvarðandi myndugleikum eigur at verða álagt at gera uppskot um politikk á sínum økjum, um tey nerta við grundarsteinar, ið hava við børn og ung at gera. At tað eru kommunurnar, sum í stóran mun virka í nærumhvørvinum hjá børnunum, ber í sær, at tað verður barna- og ungdómspolitikkurin hjá kommununum, sum verður høvuðsgrundarlagið. Landsstýrið eigur at seta sum mál, at allir sektorar skulu hava orðað uppskot til barna- og ungdómspolitikk á sínum øki innan eina ávísa tíðarfreist. Hesi uppskot skulu síðan leggjast fyri almenningin og politisku myndugleikarnar og sjóðast saman til ein langtíðar heildarpolitikk, ið tryggjar børnum og ungum bestu umstøður at trívast og mennast í.

Tá ið lógaruppskot verða smíðað, skal ein meta um, hvørt uppskotið rínur við viðurskiftini hjá børnum og ungum.

### Barna- og ungdómsráð setast á stovn

Eitt barna- og ungdómsráð eigur at verða sett á stovn, so at hesin samfelagspartur, ið ikki hevur møguleika at vera politiskt virkin ella á annan er myndugur, kann verða hoyrdur.

Ráðið, ið skal vera mannað av umboðum fyri t.d. Barnabata, Føroya Ungdómsráð og fakfólkum annars, skal vera ráðgevandi hjá landsmyndugleikum í málum, sum viðvíkja børnum og ungum. Ráðið skal somuleiðis gera útgreiningar, fylgja gongdini á økinum og koma við tilmælum um tiltøk at betra um umstøðurnar hjá børnum og ungum. Ráðið skal støðugt birta upp undir kjak á barna- og ungdómsøkinum og á tann hátt tryggja, at umstøður hjá børnum og ungum vera ovast á politiska breddanum. Barna- og ungdómsráðið skal virka óheft av politiska myndugleikunum.

# Vælferð hjá førleikatarnaðum og fólki við skerdum uppihaldsmøguleikum

Almannaverkið skal mótvirka polariseringar- og marginaliseringartrupulleikum, ið standast av samfelagsskipanini, og sum vísa seg sum sosialur ójavni, soleiðis at einstaklingar og bólkar verða útihýst frá at virka í samfelagslívinum. Fólk við førleikatarni skulu verða tryggjaðar umstøður, so at teir kunnu hava eitt sjálvstøðugt og innihaldsríkt lív á jøvnum føti við aðrar borgarar. Almannaverkið skal stuðla fólki við skerdum førleika ella skerdum uppihaldsmøguleikum.

Skipast skal ein snarskiva at ráðgeva um møguleikar og rættindi hjá fólki við skerdum førleika, eins og hjálpartólatænastan verður miðsavnað og styrkt. Harumframt er neyðugt at orða nýggjar lógarásetingar og kunngerðir, ið neyvari tilskila, hvørji rættindi fólk við skerdum førleika hava.

Fyri at tryggja førleikatarnaðum javnlík rættindi er avgerandi við løgtingssamtykt at staðfesta, at sektorábyrgd skal virka sum leiðandi meginregla. Hvør myndugleiki sær hevur ábyrgdina av at veita fólki við skerdum førleika javnlíkar tænastur. Til tess at fáa sektorábyrgd at virka, er umráðandi, at myndugleikar gerast tilvitaðir um sína ábyrgd. Ein stórur partur av hesum virkisøkinum snýr seg um hugburð. Tí er týdningarmikið at varpa ljós á og fáa alment orðaskifti um evnið og at skipa netverk millum feløg, stovnar, verk og ráð.

Umráðandi er at arbeiða út frá endurmenning (rehabilitering), ið er samstarvsháttur millum borgara, ið stendur til at fáa eitt stórliga skert lív, avvarðandi hansara og fakfólk. Endamálið er, at borgarin fær eitt sjálvstøðugt og innihaldsríkt lív. Endurmenning er grundað á lívsstøðu borgarans sum heild, og avgerðir um viðgerð fevna um samskipað og samanhangandi avrik, ið eru grundað á vitan.

## Mál

Orðað eru partmál fyri:

- Vælferðarskipan
- Atkomu
- Bústaðarmøguleikar
- At vera virkin
- Arbeiðs- og útbúgvingarmøguleikar
- Inntøkutrygd
- Uppihaldspeningar

## Vælferðarskipan

Vælferðarskipanin skal forða fyri sosialari avbyrging

Tað er eitt mál í sær sjálvum at forða fyri sosialari avbyrging og at tryggja, at tey, ið eru komin í einhvørja sosiala skipan, sleppa burtur úr støðuni, um til ber. Til tess at hjálpa nýggjum viðskiftafólki burtur úr sosialum trupulleikum, so skjótt sum til ber, og til tess at forða fyri, at tey verða verandi í skipanini, er neyðugt at styrkja um upplýsing, sosiala ráðgeving og vegleiðing, uppsøkjandi virksemi, uppfylging og tvørfakligt samstarv.

Nakrir bólkar hava serligan tørv á fyribyrgjandi arbeiði, t.d. familjur við brekaðum børnum, vaksin við likamligum ella sálarligum breki og einstaklingar/familjur. Hesi hava sosialar og sálarligar trupulleikar, og teimum tørvar umfatandi, persónligan stuðul, ráð og vegleiðing til at koma sær burtur úr svárum, sosialum trupulleikum.

## Atkoma

Atkoma hjá rørslutarnaðum skal tryggjast

Ein tann sjónligasti vansin hjá kropsliga tarnaðum eru teir mangan vánaligu atkomumøguleikarnir, serliga hjá rørslutarnaðum, ið ikki sleppa um høgar trappur og smalar dyr.

Hugtakið atkoma tekur støði í altjóða hugtakinum »universal design«, ið fevnir um atkomu fyri øll í almennar bygningar, verkløg og samferðslu. Við lóg skal tí verða ásett, at atkomuviðurskifti skulu vera fyri øll, og fyri ný- og umbyggingar skal lógin setast í gildi frá 2008. Fyri verandi bygningar verður ásett ein skiftistíð hiðani til 2015.

Viðvíkjandi privatum bygningum og verkløgum, ið ikki eru ætlað almenninginum, eiga at verða gjørdar vegleiðingar fyri lívsgongdarbygging.

**Samskifti hjá blindum og deyvum**

Blind/sjónveik og deyv/tunghoyrd skulu heldur ikki verða avskorin frá tøkniligu samskiftismenningini. Tey skulu somuleiðis hava atgongd til vitan og kunna vera við í samskiftinum í samfelagnum sum heild. Við hesum verður hugsað um eitt nú heimasíður, almenn tiltøk, miðlar og myndugleikar, og miðað verður ímóti, at allar føroyskar sendingar í sjónvarpi verða tekstaðar.

## Bústaðarøguleikar

Bústaðarmøguleikar hjá førleikatarnaðum skulu tryggjast

Við fjølbroyttum bústaðarmarknaði eiga fólk við serligum tørvi at kunna velja sær bústað, ið hóskar teimum. Rætturin til eginlív er grundleggjandi og eigur at virðast, og vælferðarsamfelagið eigur at tryggja henda rætt. Bústaðarviðurskiftini eiga tí at kunna geva førleikatarnaðum eitt so sjálvvalt gerandislív, sum gjørligt.

Bústaðartilboð og sosialpedagogisk viðgerðartilboð skulu tí vera atskild og vera óheft hvør av øðrum. Har, ið til ber, verður farið frá stovnshugtakinum til persónligar loysnir, og hin einstaki skal sjálvur kunna eiga ella leiga og gjalda samsvarandi. Tískil eigur bústaðarpolitikkurin fyri førleikatarnað at verða hugsaður inn í tann yvirskipaða bústaðarpolitikkin.

Umframt yvirskipaðu broytingarnar á bústaðarøkinum er neyðugt við ítøkiligum átøkum. Byggjast skulu almenn og sethús, lutaíbúðir ella leiguíbúðir, so at fólk við skerdum førleika kunnu útvega sær egnan bústað um alt landið. Gjøgnum byggilóggávuna skal ásetast, at atkoma fyri øll skal hugsast inn í byggiverkætlanir. Eitt hugskot kundi verið at skriva út arkitektakapping at menna eina skipaða byggiætlan fyri alt landið.

## At vera virkin

Førleikatarnað skulu stuðlast, so at tey eru so virkin, sum til ber

Fíggjarligur stuðul til viðgerð, uppvenjing og viðlíkahaldsvenjing til vaksin og børn, ið bera brek ella hava varandi sjúku, eigur at vera umlagdur frá einstaklingastuðli til skipað viðgerðartilboð á verandi stovnum ella á øðrum viðgerðarstøðum, sum tað almenna stovnar ella ger sáttmála við.

Onnur viðgerðartilboð til fjølbrekað børn og vaksin mugu skipast undir heilsuverkinum, so at sleppast kann undan einstaklingaloysnum at senda fólk av landinum til viðgerðar.

### Viðgerðartilboð

Uppafturvenjing og viðlíkahaldsvenjing eiga at verða veittar øllum eftir tørvi, so at samfelagið arbeiðir fyri, at øll kunnu vera virkin. Fyribyrging og viðlíkahaldsvenjing skulu í fyrstu syftu vera í primersektorinum, og uppafturvenjing skal verða sundurlutað millum primera og sekundera sektorin.

Viðgerðin av nervasjúklingum skal skipast við djúptøknari venjing, eftirviðgerð, ráðgeving og eftirmeting við tí fyri eygað at tillaga tilboðini. Sjúkrahúsini skulu menna sín serkunnleika og veita ymisk uppvenjingartilboð. Økisterapiin skal mennast og víðkast til tess at bøta um møguleikarnar hjá tí einstaka at liva og virka í egnum heimi.

Samstarvið millum heilsuverk og almannaverk skal styrkjast. Millum annað skulu sjúklingar longu á sjúkrahúsunum verða kunnaðir um veitingar og rættindi við eitt nú kunningartilfari frá Almannastovuni.

## Arbeiðs- og útbúgvingarmøguleikar

Arbeiðs- og útbúgvingarmøguleikar hjá førleikatarnaðum skulu betrast, so at flest møguligt gerast fíggjarliga sjálvbjargin

Við einum rúmligum arbeiðsmarknaði eiga eisini fólk við skerdum førleika at vera ein natúrligur partur av arbeiðsmarknaðinum. Virkni og luttøka í samfelagslívinum er eitt aðalmál í sjálvum sær og skal helst virka við til, at flest møguligt gerast fíggjarliga sjálvbjargin av at arbeiða.

### Endurbúgving og rúmligur arbeiðsmarknaður

Orka eigur at leggjast í einstaklingavirkni við upplýsing, arbeiðsligari ráðgeving og vegleiðing, hjálp til at útvega arbeiði ella til at finna hóskandi útbúgvingarstovn. Samband og avtalur skulu eisini fáast í lag við arbeiðspláss um arbeiðsroyndir, uppvenjingarpláss, upplæringarpláss, vard størv og tílíkt. Partarnir á arbeiðsmarknaðinum skulu binda seg til at gera skipanir, ið gera arbeiðsmarknaðin rúmligan. Ein fortreyt fyri hesum er, at atkomuviðurskiftini eru í lagi á arbeiðsplássunum, og møguleiki eigur at vera at fáa stuðulsfólk við til arbeiðis, um tørvur er á tí.

### Vard arbeiðstilboð

Arbeiðsávísingin eigur at hava javnbjóðis skyldur mótvegis fólki við skerdum førleika. Skipast skal eitt stuðuls-

toymi, ið skal upplýsa um skipanina við vardum størvum, ráðgeva um at handfara truplar støður og hava eftirlit við skipanini. Við fyritíðarpensjón fyri lutvíst mistan arbeiðsførleika skal kunna nýtast tann arbeiðsførleiki, ið eftir er. Tað kann gerast við serstakari hjálp til at útvega arbeiði, og førleikatarnað, ið ikki kunnu vera á arbeiðsmarknaðinum, skulu fáa serlig tilboð um at arbeiða á vardum verkstøðum.

Endamálið við tilboðum á vardum verkstøðum skal tó vera at menna fólk til at kunna vera á vanliga arbeiðsmarknaðinum.

Í dagpeningamálum skal verða ásett við lóg, at umsjón skal havast við støðuni eftir ávísa tíð, so at ein kann veita skjóta hjálp, um tørvur er á ráðgeving, vegleiðing og fyrireiking av neyðugum endurbúgvingartiltaki.

### Næmingar við serligum tørvi

Við at hava fyrilit fyri førleikatarnaðum, verða tey somuleiðis ein natúrligur partur av útbúgvingarskipanini. Skúlin eigur at gáa eftir tørvinum hjá øllum næmingum, og hetta er fortreyt fyri, at børn og ung við førleikatarni fáa tann lærdóm, tey skulu hava.

Skúlaskipanin skal vera til hjálpar, tá ið børn og ung í styttri ella longri tíð eru burtur frá skúla fyri sjúku. Tá ið neyðugt er, skulu næmingar fáa stuðul og hjálpartól.

Eisini miðnámsskúlar, yrkisskúlar og hægri skúlar skulu hava fyrilit fyri tørvinum hjá einstaka næminginum. Ráðgevingartænasta til næmingar við serligum tørvi verður gjølligari umrødd í grundarsteininum fyri útbúgving.

## Inntøkutrygd

Førleikatarnaðum eigur at verða tryggjað ein inntøka, sum kann hjálpa teimum at hava eitt gott og sjálvstøðugt lív – sama hvør arbeiðsførleiki teirra er

Stuðlað skal verða upp undir, at fólk, ið bera brek, fáa somu rættindi og skyldur sum øll onnur. Fólk við førleikatarni eigur tí at verða tryggjað ein inntøka, sum kann hjálpa teimum at hava eitt gott og sjálvstøðugt lív – á jøvnum føti við aðrar borgarar – og sama hvør arbeiðsførleiki teirra annars er.

Hóast fólk er ella verður førleikatarnað, so er meginreglan hon, at nakað av arbeiðsførleikanum er eftir, og hann eiga tey at menna og nýta, m.a. við endurbúgving og broyttum arbeiðsumstøðum, vardum størvum við lønarískoyti, løttum arbeiði og persónligum stuðli.

Hetta er ein meginregla, men samfelagið tó tryggja lívsgrundarlagið hjá førleikatarnaðum við fyritíðarpensjón ella lønarískoyti. Peningurin verður latin fyri mista arbeiðsinntøku og skal vera so mikið nógvur, at grundarlag verður fyri einum góðum og sjálvstøðugum lívi. Lægsta fyritíðarpensjón skal strikast, so at bert tvey pensjónsstig eru eftir, og øll skulu fáa somu upphædd, umframt endurgjald fyri eykaútreiðslur orsakað av brekinum. Gift og ógift skulu javnsetast, eins og fyritíðarpensjónistar, ið fáa uppihald á stovni, skulu varðveita sína pensjón.

Málsviðgerðin í sambandi við fyritíðarpensjón skal vera góð, og avgerðir skulu byggja á ein resursuprofil og ikki einans á metingar hjá lækna. Miðað eigur at verða ímóti stytst møguligari málsvigerð, ið byggir á eina heildar-

áskoðan, við einum samskipara, ið tryggjar, at málsviðgerðin er í lagi.

## Uppihaldspeningur

### Uppihaldspeningur skal koma betur til góðar hjá teimum, ið veruliga tørvar hann

Summar forsorgarveitingar eru tungar at umsita, torskildar og kunnu eisini tykjast órímiligar, og í øðrum førum er eingir møguleikar at hjálpa teimum, sum eru ringast fyri fíggjarliga. Hetta er neyðugt at bøta um.

Tørvsásetta uppihaldsveitingin til fólk, sum í eini lógarásettari fyribilstíð ikki kunna lívbjarga sær orsakað av sosialum hendingum so sum sjúku, samlívssliti, barnsburði, arbeiðsloysi o.s.fr., verður einfaldgjørd. Veitingin verður lógarásett við føstum upphæddum, gjørd óheft av borgarastøðu, sambærilig við vanliga lønarinntøku og skattskyldug.

Støða skal verða tikin til, um fyribilshjálp eftir almannalógini – sama, hvør orsøkin til hjálpina er – altíð skal vera óheft av ognarviðurskiftum hins einstaka í eina tíð, t.d. í tríggjar mánaðir. Ásett skal vera í lógini, hvussu leingi fyribilshjálp kann verða givin.

Bústaðarstuðul eigur at verða veittur til veruliga einsamallar uppihaldarar og aðrar fíggjarliga veikar familjur.

Barnafrádrátturin í skattinum eigur at verða umlagdur til barnastyrk, so at veruliga stakir uppihaldarar fáa hægri veiting.

Stuðul eigur at verða latin ungum, ið hava brektreytaðar meirútreiðslur í sambandi við útbúgving, men sum annars ikki eru øðrvísi fyri enn onnur ung og tí eiga at klára seg við útbúgvingarstuðli. Somuleiðis eigur veiting til fólk, sum av sjúku ella skaða tørvar hjálp til endurbúgving, at vera óheft av ognarviðurskiftum og borgarastøðu. Somuleiðis skal gerast skattskyldugt tað endurgjald til foreldur, sum missa inntøku av at vera hjá brekaðum ella varandi sjúkum barni heima ella undir viðgerð.



## Eldravælferð

Stórar avbjóðingar standa fyri framman á eldraøkinum næstu árini. Stórur munur er á pensjónsviðurskiftunum hjá borgarunum, og hesin munur fer at vaksa og elva til stórar ójavnar á eldraárunum, um ein pensjónsumbroyting ikki verður gjøgnumførd. Harumframt er stórur tørvur á eldrabúplássum, og vantandi samansjóðing er av ymisku vælferðartænastunum fyri eldri fólk. Eitt greitt ábyrgdarbýti millum land og kommunur og millum heilsuverk og almannaverk eigur tí at fremjast á eldraøkinum. Eisini eigur at orðast ein verulig eldralóg, ið tryggjar rættindini hjá teimum gomlu.

## Mál

Orðað eru partmál fyri:

- Pensjónsskipan
- Eldrabústaðir og eldrarøkt

## Pensjónsskipan

Pensjónsskipanin skal betrast, útbyggjast og útjavnast

Ein pensjónsskipan skal byggja á tríggjar súlur: fólkapensjón, samhaldsfasta og eina eftirlønaruppsparing eftir avtalu millum løntakarar og arbeiðsgevarar. Við fólkapensjónini og samhaldsfasta verður tryggjað ein rímilig minstapensjón, og eftirlønaruppsparingin verður síðan bygd omaná, so at hon tryggjar inntøkuna hjá løntakaranum, tá ið hann fer um pensjónsaldur.

Ein arbeiðsbólkur umboðandi arbeiðsmarknaðin og landsstýrið greinar pensjónsviðurskiftini og ger uppskot um, hvussu eftirlønaruppsparingin skal skipast og tvinnast saman við hinar pensjónshættirnar. Við støði í hesum verður avgerð tikin um, hvørt eftirlønaruppsparingin skal setast í verk við lóg ella við sáttmála við arbeiðsmarknaðin.



Í 2015 skulu allar tríggjar pensjónssúlurnar geva eina upphædd, sum í minsta lagi svarar til 65% av lønarinntøkuni, tó ongantíð minni enn eina arbeiðsmannaløn. Hjá teimum, ið ikki hava eftirlønaruppsparing frá arbeiðsmarknaðinum, skal øll pensjónsupphæddin svara til í minsta lagi 65% av eini arbeiðsmannaløn.

Harumframt verður arbeitt fram ímóti, at pensjónistar skulu varðveita fólkapensjónina, eisini eftir at flutt verður á ellis- og røktarheim.

## Eldrabústaðir og eldrarøkt

### Eldrabústaðir og eldrarøkt skulu samantvinnast betur, og tørvurin á eldrabúplássum skal verða nøktaður

Til ár 2010 skulu byggjast knappliga hálvtannaðhundrað røktarheims- og sambýlispláss, soleiðis at tørvurin á eldrabúplássum fyri alt landið verður nøktaður. Harumframt eiga gomlu ellis- og røktarheimini at verða nútímansgjørd.

Eldrarøktin skal útbyggjast til at nøkta ymiskan tørv, soleiðis at teimum eldru verður veitt tann røkt og umsorgan, sum hóskar best til tann einstaka. Umframt at gera búpláss til ymiskar brúkarabólkar, skulu starvsfólkini mennast fakliga. Serligar fyriskipanir skulu setast í verk fyri tey fólkini, sum ganga í barndømi og avvarðandi teirra, og setast skal á stovn eitt toymi um minnisleys, sum skal ráðgeva avvarðandi og starvsfólki.

Ein serlækni í ellifrøði skal setast fyri at styrkja geriatriska og gerontologiska økið.

### Karmar um eldraøkið

Ein týdningarmikil uppgáva verður at tryggja rættindini hjá teimum eldru í eini nýggjari eldralóg. Borgarin eigur at vita minsta markið fyri, hvørjar tænastur, hann hevur rætt til. Hesi rættindini skulu tryggjast í eini rammulóg fyri alt eldraøkið og skulu áseta stigið á teimum persónligu tænastuveitingunum til eldri.

Eldralógin skal áseta, hvør hevur myndugleika á eldraøkinum, áseta minstamark fyri útboði av tænastum á eldraøkinum, áseta, hvørjar skyldur avvarðandi myndugleikar hava mótvegis borgaranum, áseta, hvør hevur eftirlitsskyldu á eldraøkinum o.a.

Somuleiðis verður gjørd rammulóg um raksturin av ellis- og røktarheimum og sambýlum, við ásetingum um støðið á bygningunum, krøv til innrætting, minstamørk fyri starvsfólkatali á ymsu stovnunum, og um upptøkureglur og bíðilistar.

Skipað verður harumframt fyri ráðgevandi brúkararáði við tilknýti til bústovnarnar, har avvarðandi, áhugabólkar og onnur kunnu fáa umboðan.

### Lutaíbúðafeløg

Gerast skal lóggáva um lutaíbúðafeløg, so at til ber at byggja og skipa vardar íbúðir sum lutaíbúðafeløg. Bústaðarpakkin skal allur verða framdur í seinasta lagi í 2010 og skal millum annað tryggja eitt umskifti á bústaðarmarknaðinum, so at eldri fólk kunnu flyta úr stórum í minni bústaðir. Fyri pensjónistar í egnum húsum eiga eisini at verða skaptir møguleikar fyri bjálvingar- og orkusparandi tiltøkum.

### Uppvenjing og eftirviðgerð

Munandi skal verða bøtt um tilboðini til uppvenjing og eftirviðgerð til heimabúgvandi pensjónistar – herímillum fysio- og ergoterapi. Hetta skal eisini síggjast í sambandi við fólkaheilsupolitikkin, ið hartil skal fevna um heilsustimbrandi og sjúkufyribyrgjandi skipanir, m.a. heimavitjanartænastu og tiltøk fyri fólkapensjónistar. Tað verður gjørt í samráði við brúkararáð, dagtilhald, pensjónistafeløg, ítróttarfeløg, kostráðgevar og onnur.

### Heildarskipan av eldrarøktini

Eldrarøktin verður skipað í samanhangandi tænastueindir, samansettar av heimatænastu, eldrasambýlum og ellis- og røktarheimum. Hesar tænastueindirnar skulu koma í staðin fyri verandi sjálvsognarstovnar og skulu verða skipaðar undir felags leiðslu. Hvør tænastueind skal hava eina upptøkunevnd.

Umsorgararbeiði, ið fevnir um mattænastu, koyritænastu og dagtilhald, verður umskipað, so at dagtilhaldini verða eitt lokalt trivnaðarvirksemi, sum kommunurnar varða av, og mattænasta og koyritænasta verða skipaðar undir heimatænastuna, sum landið varðar av.

## Fjølbroyttir bústaðarmøguleikar

Bústaðarpolitikkur er sjálvsagdur táttur í at siga øllum vælferðarskipanum, bæði hvat viðvíkir eldri, sálarsjúkum og brekaðum. Bústaðarviðurskifti eru viðgjørd fleiristaðni í grundarsteininum fyri vælferð, men neyðugt er við einum heildarpolitikki á økinum, tí bústaðurin er fyritreyt fyri vælferðini hjá fólki sum heild.

## Mál fyri bústaðarøki

Broytt bústaðarlóggáva skal skapa fyritreytir fyri fjøltáttaðum bústaðarmøguleikum

Framdur verður ein miðvísur bústaðarpolitikkur, so at neyðug nútímansgerð og nýhugsan er á bústaðarøkinum. Leiguíbúðir og sethús eru eisini ógvuliga tyngjandi kostnaðarliga, serliga hjá barnafamiljum, og tí er stórur tørvur á at fremja ein bústaðarpolitikk, sum hevur fyrilit fyri hesum.

Yvirskipaða málið er at gera neyðugar lógar- og fíggjarkarmar, so at vit fáa fjølbroyttari bústaðarmøguleikar, har úrvalið og umbýtið av bústøðum gerst størri, bæði millum ung og gomul, støk og familjur og annars fólk við ymiskari fíggjarorku. Við størri og fjøltáttaðum útboði verður eisini lætt um trýstið á bústaðarmarknaðinum. Hetta fer at hava við sær, at lættari verður at fáa hóskandi bústaðir fyri hóskandi kostnað, eins og bústaðarmøguleikar skulu vera fyri fólk við serligum tørvi.

## Bústaðarpolitisk ætlan

Fyri at røkka málinum um fjølbroyttar bústaðarmøguleikar, verður framd tann bústaðarpolitiska ætlan, ið longu er orðað. Henda ætlan hevur við sær, at Húsalánsgrunnurin og Íbúðagrunnurin við lóg verða umskipaðir til alment partafelag. Hetta bústaðarpartafelag skal fíggja bústaðir til fólk við serligum tørvi. Bjálvingarstuðulslánsgrunnurin verður avtikin, og nýggja bústaðarpartafelagið skal so veita avdráttarfrí lán til bjálving og orkusparandi tiltøk hjá fólka- og fyritíðarpensjonistum, sum búgva í egnum bústaði. Gjørd verður lóg um lutaíbúðafeløg. Henda lóg skal vera karmur um vanlig lutaíbúðafeløg eins væl og serlig lutaíbúðafeløg, ið eru ætlað at standa fyri bústøðum til fólk við serligum tørvi. MVG-lóggávan og rentustuðulslóggávan verða broyttar, so at lutaíbúðafeløg fáa somu rættindi og skyldur sum tey, ið byggja egin sethús. Somuleiðis verður gjørd nýggj føroysk leigulóg fyri eginbústaðir, ið skal tryggja rættindini hjá leigarum og útleigarum, eins og skattalóggávan verður broytt, so at skattingin av inntøku, ið stavar frá útleigu til eginbústaðir, verður á sama stigi sum vanligur partafelagsskattur.

## Lóggáva um fastognarkeyp

Við lóg skulu vit tryggja rættindi og skyldur í sambandi við keyp og sølu á bústaðarmarknaðinum, m.a. við lóg um fastognarkeyp, har eitt nú støðulýsing verður kravd, og við lóg um húsamekling, ið skal skipa umstøðurnar í sambandi við keyp og sølu gjøgnum húsameklarar.



## Fólkaheilsa og heilsuverk

Heilsustøða fólksins eigur alsamt at gerast betri, bæði við heilsutænastum og við at virka fyri, at myndugleikar, stovnar, fyritøkur, felagsskapir og borgarar miðvíst og stigvíst arbeiða fyri at betri heilsustøðu og lívsgóðsku, og soleiðis fyri at leingja um lívstíðina.

Allar skipanir í primera heilsuverkinum eiga at verða samansjóðaðar undir eini felags, yvirskipaðari leiðslu í samstarvi við sekundera heilsverkið. Somuleiðis verða høvuðspartarnir í heildarspsykiatriini samskipaðir og útbygdir, og apotekstverkið fær ein týðandi leiklut í at ráðgeva um heilivágsnýtslu og heilsu, og skal eisini sjálvt menna nissjuframleiðslu av heilvági í smærri nøgdum til útflutnings.

## Mál

Orðað eru partmál fyri:

- Fólkaheilsu
- Samskipan
- Apoteksverkið
- Heildarpsykiatri

## Fólkaheilsan

Heilsan skal vera tilvitaður partur av lívshátti okkara, so at fólkaheilsan sum heild batnar

Í londunum kring okkum verða alsamt fleiri fólk sjúk orsakað av lívshátti sínum, og mangt bendir á, at sama gongd er í Føroyum. Sjúkur, sum í høvuðsheitum standast av lívsháttinum, og sum eru vanligar millum manna, verða nevndar fólkasjúkur. Tær hava við sær stórar avleiðingar, bæði fyri hin einstaka og fyri samfelagið alt. Av somu orsøk er alsamt neyðugt at gera fólkaheilsuætlanir, ið skulu betra um heilsustøðuna hjá fólki, og hetta verður gjørt við bæði heilsufremjandi og sjúkufyribyrgjandi tiltøkum.

### Vitan og ítøkilig tiltøk

Tá ið ræður um fólkaheilsu, ber ikki til at gera alt í senn, men neyðugt er at raðfesta. Tí verður arbeiðið skipað í tveir høvuðspartar: 1) at fáa vitan til vegar um fólkaheilsustøðu føroyinga, og 2) at seta í verk ítøkilig heilsufremjandi og sjúkufyribyrgjandi tiltøk. Um tað fyrra stendur at lesa um undir vælferð og vælferðargransking, men longu áðrenn hesi úrslit eru fingin til vegar, ber til at seta ítøkilig tiltøk í verk. Tey snúgva seg í høvuðsheitum um kost, rørslu, royking og rúsdrekka- og rúsevnismisnýtslu.

### Heilsugóður kostur

Miðað verður ímóti, at vit eta heilsugóðan kost. Serliga skal dentur verða lagdur á børn í dagansing og á næmingar í fólkaskúlanum, umframt at bøtt skal verða um matumstøðurnar á skúlunum. Talið á føroyingum, ið viga ov nógv, skal minka munandi. Átøk viðvíkjandi sunnum kosti og kostvanum skulu gerast, m.a. kostætlan fyri børn í dagansing og fyri næmingar í skúlunum, eins og frukt og grønmeti skulu vera atkomulig og ódýr hjá øllum. Aftur at hesum skulu gerast lýsingarátøk til at fremja sunnari kostvanar, ið fylgja norðurlendsku føðslutilmælunum. Stovnast skal eitt kosttoymi, ið skal veita bólkum og einstaklingum ráð um sunnan kost og um at broyta kostvanarnar.

### Rørsla og likamsvirkni

Økt likamsvirkni og rørsla skulu vera natúrligur lutur í gerandisdegnum. Talið á teimum, sum røra seg regluliga, skal økjast munandi. Við stigvísari øking í tímatalinum, skulu allir skúlanæmingar í 2015 hava ein skúlatíma í likamsvirkni dagliga. Gjørd skal verða rørsluætlan fyri børn á dagstovnum og fyri næmingar í skúlunum, og møguleikarnir fyri kropsvenjing á arbeiðsplássum skulu betrast. Í 2009 skal ein triðingur av øllum almennum arbeiðsplássum hava tikið stig til, at starvsfólkið hevur atgongd til kropsvenjing í arbeiðstíðini. Ein ítøkilig ætlan um súkklubreytir skal gerast innan 2009, so til ber at súkkla trygt. Tað fer at skapa møguleikar fyri meiri gerandisrørslu hjá fólki, m.a. á veg til arbeiðis og frá arbeiði. Økt eigur eisini at verða um likamsvirknið hjá gomlum. Størri dentur skal leggjast á fimi innan ítrótt, sum eigur at verða gjørt í samráði við sjálvbodnu ítróttarrørsluna. Harumframt eigur at verða skipað fyri einum rørsluári – nevnt »Føroyar í rørslu«.

### Royking

Øll hava rætt til at liva og virka í einum roykfríum umhvørvi. Málið er at minka um tubbaksnýtsluna og sostatt minka um heilsuskaðarnar, ið standast av royking. Í 2009 skal talið á roykjarum í mesta lagi vera 20% av fólkinum. Í 2015 skal tað í mesta lagi vera 10%. Talið á teimum, sum byrja at roykja, skal minka munandi. Tilboð um roykiavvenjing skal bjóðast øllum, sum vilja gevast at roykja. Serstøk tilboð um roykiavvenjing skulu bjóðast skúlanæmingum. Tiltøkini ímóti royking skulu serliga verða ætlað børnum og ungum, so at byrgt verður fyri, at tey fara at roykja, og at tey, sum roykja, gevast. Miðast skal eftir, at eingin, ið er føddur í 2000 ella seinni, fer at royka. Alt fleiri støð skulu vera roykfrí, og í 2008 skal eingin roykja á almennum støðum, har fólk kemur saman til arbeiðis ella í frítíð. Roykipolitikkur skal orðast á øllum arbeiðsplássum. Harumframt skal lógarverkið støðugt dagførast, tubbaksprísurin skal stýrast, og upplýsast skal um heilsuvandarnar við at roykja.

### Rúsdrekka- og rúsevnismisnýtsla

Málini eru, at rúsdrekkamisnýtslan sum heild skal minka, og byrjanaraldurin fyri, nær ung fara at drekka, verður útsettur. Børnum og ungum skal tryggjast ein uppvøkstur, sum er fríur fyri rúsdrekka- og rúsevnamisnýtslu, og medisinsku og sosialu skaðaárinini av rúsdrekka- og rúsevnasmisnýtslu skulu minka. Føroyar skulu somuleiðis verða rúsevnafríar. Til tess at røkka hesum málum er neyðugt at seta fyribyrgjandi tiltøk í verk, sum m.a. snúgva seg um at upplýsa um heilsuvandar við misnýtslu, økja talið á rúsdrekka- og rúsevnafríum umhvørvum, hava góð viðgerðartilboð, orða rúsdrekka- og rúsevnaspolitikk á øllum arbeiðsplássum, og tryggja, at eftirlitið við innflutningi av ólógligum rúsevnum verður betri.

## Samskipan

Ymsu partarnir av heilsuverkinum eiga at verða samskipaðir og eiga at samarbeiða betur

Vanligt er at skilja ímillum primera og sekundera heilsuverkið. Primera heilsuverkið fevnir um sera ymisk øki, ið eru skipað á sera ymiskan hátt. Hesi eru kommunulækna-, heilsufrøði- og sjúkrakassaskipanin, umframt rúsevnaviðgerðarstovnar o.a. Apoteksverkið og eldra-

økið, ið eisini eru partar av primera heilsuøkinum, verða viðgjørd aðrastaðni. Sekundera heilsuverkið er alt tað, ið fer fram á sjúkrahúsinum. Strategibólkurin hevur valt ikki at viðgera sjúkrahúsini, tí arbeitt hevur verið við einum áliti um hetta økið.

Verandi býtið í primert og sekundert heilsuverk er grundað á siðvenju og samfelagsligar umstøður, sum nú eru burtur. Primera virksemið var í nærumhvørvinum, ofta heima hjá sjúklinginum. Fólk hevði ikki bil, og sjúkraflutningur við serútgjørdum akførum og starvsfólki var trupul og seinførur. Viðgerðar- og kanningarhættirnir vóru lítið framkomnir, tað mesta av útgerðini hjá læknanum rúmaðist í eini tasku, og elektroniskt samskifti við sjúkrahús og starvsfelagar var einki uttan gjøgnum telefon. Hetta hevur havt við sær, at upplýsingarnar millum primera og sekundera heilsuverkið hava verið avmarkaðar og ófullfíggjaðar. Tískil er nógv óneyðugt dupultarbeiði gjørt við nýggjum sjúklingakanningum í sekundera heilsuverkinum, tó at tað longu er gjørt í primera heilsuverkinum, eins og uppbýtið sum heild hevur tarnað arbeiðinum og elvt til fløskuhálstrupulleikar.

Tí er neyðugt at samansjóða allar skipanir í primera heilsuverkinum undir ein koll saman við sekundera heilsuverkinum, við eini felags yvirskipaðari leiðslu fyri bæði primera og sekundera heilsuverkið.

### Talgild heilsuskipan fyri alt heilsuøkið

Talgilda heilsuskipanin skal fevna um alt heilsuøkið, har øll øki hava felags brúkarar, og har allar skipanir hava atgongd til somu upplýsingar. Tá ið sjúklingar ella klientar skulu viðgerast, verða fyrimunirnir, at samskiftið verður meiri einsháttað millum ymisku partarnar í heilsuverkinum og sjúklingin, og sjúklingurin sleppur undan at siga sjúkrasøgu sína fleiri ferðir og gera somu royndir umaftur. Sjúklingagongdin verður tí bæði lættari og skjótari. Viðgerð og røkt verða betri, og vandin fyri skeivum avgerðum minkar, m.a. tí at lættari verður hjá heilsustarvsfólki at gera av, hvørja viðgerð, sjúklingurin skal hava.

Aðrir fyrimunir eru, at upplýsingarnar verða altíð dagførdar, og møguleikar vera at síggja sína egnu journal á alnetinum. Alt hetta fer so eisini at geva góðar møguleikar at útvega hagtøl um øll øki í heilsuverkinum.

### Kommunulæknar

Umframt hesa samansjóðing av primera og sekundera heilsuverkinum, eiga kommunulæknarnir at verða settir við fastari løn, á sama hátt sum t.d. deildarlæknar á sjúkrahúsunum. Gjørd eigur at verða vaktarskipan fyri kommunulæknar, so at allir læknar við førleika til tess kunnu melda seg til skipanina og taka vaktir. Hetta átti at gjørt, at kommunulæknastørvini vóru meiri spennandi at søkja, tí at vaktarbyrðan tá verður lutað á fleiri læknar – eisini aðrar enn kommunulæknar.

### Sjúkrakassin

Verandi sjúkrakassaskipan verður nútímansgjørd ella avtikin, so at eitt nú gjøld til neyðugu tænasturnar í staðin verða kravd um skattin.

## Apoteksverkið

Apoteksverkið verður heilsufakligur vitanar- og framleiðsludepil fyri heilivág

Vísindaliga og tøkniliga menningin hevur havt við sær stór frambrot fyri heilsu og heilsurøkt, og nýggir møguleikar fyri heilsubót og linna hava økt nógv um heilvágsnýtsluna. Hetta er tó ikki einasta orsøkin, tí fólkasjúkur og ein alt hægri miðalaldur vaksa eisini um nýtsluna.

Apoteksverkið eigur at skipa fyri tiltøkum og átøkum til tess at hjálpa fólki við heilsuni. Millum hesi átøk skulu vera fyribyrgjandi kanningar, har fólk kunnu fáa kannað eitt nú blóðtrýst, blóðsukur og kolesterol. Nógvar sjúkur kunnu harumframt staðfestast við einfaldari kanningarútgerð, sum fæst á apotekunum.

Apoteksverkið verður knýtt at talgildu heilsuskipanini saman við hinum stovnunum í heilsuverkinum. Tað fer at virka við til eina samskipaða heildarfatan og heildarviðgerð av sjúklinginum og fer at geva brúkaranum eina heildaruppliving av samskifti sínum við heilsuverkið. Apoteksverkið kemur sostatt at veita heilivág til føroyska sjúkrahúsverkið og kommunulæknarnar, tað fer at vegleiða serlæknar og onnur heilsustarvsfólk í nýtslu av heilivági, og tað fer eisini við sínum serkunnleika at upplýsa og vegleiða borgaran um heilivág og heilsu.

Kliniskir farmaseutar skulu knýtast at sjúkrahúsunum, har teir skulu vegleiða um heilivág til sjúklingar og starvsfólk. Tað fer at minka um vandan fyri skeivari heilivágsnýtslu og tískil eisini um sjúkrahúsinnleggingar.

### Heilivágsframleiðsla

Apoteksverkið fær eitt framleiðslukervi í nýmótans framleiðsluhølum á altjóða stigi, og skal í altjóða kapping framleiða heilivág í smærri nøgdum við støði í verandi og mentum førleika. Umframt at framleiða til heimamarknaðin, skal eisini framleiðast til útflutnings. 70-80% av hesi framleiðslu vera lønt arbeiði fyri heilivágsfyritøkur uttanlands.

80% av teimum, sum eru í fastari viðgerð við heilivági – t.d. varandi sjúk og gomul fólk – fara at fáa heilivág sín frá apoteksverkinum í pakkaðum skamtlutum av framleiðsludeildini hjá apoteksverkinum Tað fer at tálma heilivágsútreiðslunum, samstundis sum sjúklingurin fær betri lívsgóðsku við rættari heilivágsnýtslu. Somuleiðis fer henda framleiðsludeildin at pakka royndarheilivág til kundar bæði innanlands og uttanlands.

## Heildarpsykiatri

Heildarpsykiatriin verður ment og útbygd til ymiskan tørv

Vit hava havt trupulleikar á psykiatriska økinum, m.a. tí at vit nústani eru farin í holt við neyðuga økis- og sosialpsykiatri. Tað hevur elvt til fløskuhálstrupulleikar hjá sjúkrahúspsykiatriini. Orsakað av ov fáum bústaðartilboðum hevur ein avleiðing verið tann, at fólk hava verið noydd at ligið á sjúkrahúsinum, hóast tey hava verið liðugt viðgjørd og hava kunnað verið útskrivað. Høvuðspartarnir í heildarpsykiatriini, t.e. sjúkrahúspsykiatriin, økispsykiatriin og sosialpsykiatriin, verða samskipaðir og útbygdir hvør sær við nøktandi tilboðum.

Verandi psykiatrilóg er frá 1938, og tí skal gerast nýggj lóg, sum skal styrkja rættartrygdina hjá sálarsjúkum.

## Upplýsing um sálarsjúkur

Upplýsing um sálarsjúkur skal skipast betur, so at vitanin millum fólk um slíkar sjúkur verður munandi betrað, eisini tá ið ræður um møguleikarnar hjá sálarliga tarnaðum at virka í samfelagnum og á arbeiðsmarknaðinum. Stovnað verður eitt landsfevnandi brúkararáð, ið skal arbeiða við yvirskipaðum trupulleikum á psykiatriska økinum og koma við hugskotum um eina skilagóða menning og útbygging av tilboðum um alt landið.

## Menning av telepsykiatri

Fyri at menna psykiatrisku skipanina eiga vit at knýta størri part av samskiftinum við sjúklingar og millum starvsfólk at KT, so at vit fáa eina veruliga telepsykiatri – bæði innlendis og altjóðaliga, har starvsfólk í viðgerðarskipanini fáa lut í altjóða vitan um viðgerð og kunnu samskifta um hana.

## Psykiatriski depilin umvælast og dagførast

Psykiatriski depilin skal verða dagførdur, so at vit fáa ein nútímans depil, ið lýkur krøvini um góðan sjúkrahússtandard. Barna- og ungdómspsykiatriin eigur at útbyggjast frá eini ráðgevaraskipan til eina deild á psykiatriska deplinum, og setast skal eisini á stovn ein flytfør, ambulant gerontopsykiatrisk tænasta (sjúkugreining og viðgerð av eldri fólki við psykiatriskum sjúkum). Í hesum sambandi er neyðugt við samstarvi við kommunulæknar, heimarøkt og røktarheim, so at hetta toymi kann gerast teimum eitt tilboð um vegleiðing, greining og viðgerð av sjúklingum í egnum heimi ella á røktarheimi.



Umframt hetta skal setast í verk ein skipan, ið tryggjar, at børn og ung verða kunnað um sálarsjúku hjá foreldrum, og at tey annars fáa neyðuga hjálp.

### Økispsykiatri

Ambulanta/økispsykiatriska toymið á psykiatriska deplinum skal verða liðugt útbygt og skal hava um hendi alla eftirviðgerð av áður innløgdum sjúklingum, umframt at tað skal hava eitt ambulant viðgerðartilboð til sjúklingar, sum verða ávístir av kommunulækna. Skipað verður økistænasta við at seta økispsykiatriskar sjúkraróktarfrøðingar um alt landið.

### Sosialpsykiatri

Sálársjúk hava ymiskan bústaðartørv, og tí skulu útvegast ymisk bústaðartilboð. Sjálvstøðugir brúkarar kunnu búgva einsamallir í einstaklingaíbúðum, har eftirlitið kann vera hjá einum stuðulstoymi av fakfólki. Í øðrum førum er neyðugt við serliga innrættaðum einstaklingaíbúðum, har starvsfólk er hjá alt samdøgrið. Herímillum eiga at vera íbúðir til bráðfeingis tørv, sum fólk kann búgva í heldur enn at verða innløgd á psykiatriska depilin.

Til eldri, psykiatriskar brúkarar, ið ikki kunnu búgva á vanligum røktarheimi, eiga at verða gjørd gerontopsykiatrisk búpláss, ið kunnu skipast undir Heimarøktini.

Stuðulsmiðstøðir eiga at verða bygdar kring landið til endamálið. Dømið um hetta er ætlaði økisdepilin fyri sinnisveik í Suðuroy. Slíkar miðstøðir skulu samskipa tey tilboð, sum verða boðin sálarsjúkum í økinum, t.d. virknistilboð, samverutilboð, frálæru, frítíðarvirksemi o.a. Miðstøðirnar skulu eisini vera fyri stuðulsskipanina hjá sinnisveikum. Um tørvur er á tí, kunnu sosialpsykiatriskir bústaðir og umlættingarpláss byggjast sum partur av miðstøðunum.

Hesir strategibólkar hava arbeitt við vælferð:

**Vælferðarráð**
Helena Dam á Neystabø, leiðari, Føroya Skúlabókagrunnur, forkvinna
Gestur Hovgaard, samfelagsfrøðingur
Randi Frederiksberg, samfelagsfrøðingur
Rolf Guttesen, samfelagsfrøðingur

**Almanna og heilsugransking**
Jóanis Erik Køtlum, ráðgevi, Almanna og heilsumálaráðið, formaður
Turid Arge, deildarstjóri, Almanna- og heilsumálaráðið
Petra Johnsdóttir Joensen, stjóri, Almannastovan
Pál Weihe, yvirlækni, Deildin fyri arbeiðs- og almannaheilsu
Rúna Hilduberg, stjóri, Granskingarráðið

**Framtíðar almannalóggáva**
Maria Jacobsen, starvsfólkastjóri, Almannastovan, forkvinna
Eyðvør Mortensen, deildarleiðari, Almannastovan
Eyðun M. Hansen, deildarstjóri, Almanna- og heilsumálaráðið
Heri Petersen, fulltrúi, Almanna- og heilsumálaráðið
Marjun Kálvalíð, Meginfelag teirra Brekaðu í Føroyum

**Framtíðar fyritíðarpensjón**
Heri Petersen, fulltrúi, Almanna- og heilsumálaráðið, formaður
Marjun Berg, deildarleiðari, Almannastovan
Eyðun M. Hansen, deildarstjóri, Almanna- og heilsumálaráðið
Leila Solmunde, Meginfelag teirra Brekaðu í Føroyum

**Framtíðar eldrarøkt**
Kristjan Árnason, ráðgevi, Almanna- og heilsumálaráðið, formaður
Ronnie Thomassen, fulltrúi, Almanna- og heilsumálaráðið
Gunnleyg Durhuus, leiðari, Heimatænastan
Ása Davidsen, økisleiðari, Heimatænastan

### Fólk við skerdum førleika

Hallbera F. West, fulltrúi, Almanna- og heilsumálaráðið, forkvinna
Barbara á Tjaldrafløtti, forkvinna, Ráðið fyri Brekað
Jóanes N. Dalsgaard, deildarleiðari, Heimarøktin og Serforsorgin
Marjun Poulsen, leiðandi fysioterapeutur, Landssjúkrahúsið
Palli Mortensen, deildarleiðari, Almannastovan

### Børn og ung

Maibritt Simonsen, ráðgevi, Almanna- og heilsumálaráðið, forkvinna
Anna Dam, leiðari, Barnaverndarstovan
Oyvindur av Skarði, deildarleiðari, Almannastovan
Minna Poulsen, varaleiðari, Heilsufrøðiskipanin
Jógvan Philbrow, nevndarlimur, Føroya Pedagogfelag
Doris Hansen, Meginfelag teirra Brekaðu í Føroyum
Eyðun M. Hansen, deildarstjóri, Almanna- og heilsumálaráðið

### Psykiatriska økið

Tormóður Stórá, læknafakligur depilsleiðari, Landssjúkrahúsið, formaður
Regin Johansen, deildarleiðari, Heimarøktin og Serforsorgin
Jan Simonsen, ráðgevi, Almanna- og heilsumálaráðið
Tórhild Simonsen, fulltrúi, Almanna- og heilsumálaráðið
Bergit Weihe, Psykiatriski depilin

### Fjølbroyttir bústaðarmøguleikar

Ronnie Thomassen, fulltrúi, Almanna- og heilsumálaráðið, formaður
Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður

### Framtíðar heilsuverk

Maria á Dul, starvsfólkaleiðari, Almanna- og heilsumálaráðið, forkvinna
Birna Steingrímsdóttir, ráðgevi, Almanna- og heilsumálaráðið
Heðin Thomsen, yvirlækni, Landssjúkrahúsið
Jana H. Dalsgaard, forkvinna, Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar
Jákup N. Olsen, Sjúklingaráðið

**Framtíðar apoteksverk**

Heri Mørkøre, landsapotekari, formaður
Einar Magnússon, skrivstovustjóri í íslendska Heilsu- og trygdarmálaráðnum
Birgit Vitalis Ottosen, fulltrúi, Fíggjarmálaráðið
Turid Arge, deildarstjóri, Almanna- og heilsumálaráðið

**Fólkaheilsa**

Katrin Gaard, fulltrúi, Almanna- og heilsumálaráðið, forkvinna
Birna Steingrímsdóttir, ráðgevi, Almanna- og heilsumálaráðið
Pál Weihe, yvirlækni, Deildin fyri arbeiðs- og almannaheilsu
Høgni Debes Joensen, landslækni
Petur Elias Petersen, varaforseti, Ítróttarsamband Føroya
Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður